## Hvør trygdarútgerð er neyðug?

### Roykvarnarar bjarga lívi

Kanningar hava víst, at í 75 prosentum av deyðseldum var eingin roykvarnari, og at helvtin av øllum íbúðum og húsum ikki hava roykvarnarar.



### Roykvarnarar

Sum tummilsregla skal í minsta lagi ein roykvarnari vera á hvørjari hædd – helst í ganginum – og í mesta lagi 10 metrar skulu vera millum teirra. Roykvarnarar eru serliga umráðandi við sovikømur. Set ikki ein varnara beint við køk ella baðirúm, tí osi frá steiking, dampur frá heitum vatni o.t. kann seta varnaran í gongd.

### Eldsløkkjarar

Fleiri sløg av eld-sløkkjarum finnast. Í køki skal í minsta lagi ein 5 kg $CO_2$ ella 6 kg pulvursløkkjari vera. Bið um ráðgeving á sølustaðnum.



### Brandteppi

Brandteppi eru sera hent til at sløkkja eld í feitti, sløkkja lítlan eld, ella tá eldur kemur í fólk. Hav tí altíð eitt brandteppi í húsinum, helst í køkinum og við eldstað.



### Stigar

Stigar kunnu brúkast til rýming og bjarging. Hav ein leysan stiga liggjandi ella set ein brandstiga fastan á húsini. Bið um ráðgeving á sølustaðnum, hvør útgerð er hóskandi til títt heim.



### Bjargingarop

Vindeygu kunnu virka sum bjargingarop. Sum tummilsregla skulu tey í minsta lagi verða 150 cm, tá hædd og breidd vera løgd saman. Er bjargingaropið meira enn 4 m yvir lendi, eigur stigi at vera.

### Rýmingarætlan

Ger eina rýmingarætlan og far ígjøgnum hana saman við øllum húsfólkinum. Vís øllum rýmingarvegir, sløkkiútgerð og roykvarnarar, og hvussu hesi virka. Ger mannagongdir, sum skulu fylgjast, um eldur kemur í.





## Hvar fái eg meira at vita?

Fleiri góð ráð og upplýsingar um krøv til sethús og íbúðir eru at finna á heimasíðunum hjá Brunaumsjón Landsins, umframt donsku og norsku brunaumsjónunum.

Brunaumsjón Landsins: **www.brl.fo**
Danska brunaumsjónin: **www.brs.dk**
Norska brunaumsjónin: **www.dsb.no**

sansir.fo • prent: Føroyaprent • november 2007



## Ring 1-1-2

- Sig, hvat er áfatt
- Sig, hvar tú ert
- Sig, hvør tú ert
- Sig, hvør og hvat er í húsi (fólk, djór og eldfimt tilfar)
- Svara øllum spurningum hjá Alarmsentralinum
- Legg ikki hornið á, fyrr enn tú fært boð um tað frá vakthavandi

Útgivið í samstarvi við
Brunaumsjón Landsins

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Eldsbruni

## – hvussu verja vit okkum?



**Vegleiðing til føroysk húski**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Hvussu kyknar eldur?

Sløkkiliðið sær alt ov ofta, at eldur kemur í, tí vit hava verið óskettin ella vita ov lítið um, hvussu eldur kyknar. Orsøkirnar til eldsbruna kunnu vera nógvar, men summar ganga aftur.



## Sigarettir og kertuljós

Sigarettir og kertuljós eru ofta atvoldin til eld, tí vit brúka tey nógv og fara ofta frá teimum uttan at sløkkja. Royking er atvoldin til umleið helvtina av øllum deyðseldum. Sovnar tú til dømis í lenistólinum við sigarett í hond, kann ein glóð frá sigarettini skjótt festa í, og vandamikli roykurin ger, at tú ikki vaknar aftur. Far ongantíð úr einum rúmi uttan at sløkkja sigarettir og kertuljós.

## Eldfimur løgur

Bara ein lítil neisti frá til dømis eini sigarett er nóg mikið til at festa í dampin frá eldfimum løgi so sum bensini, so tað førir til eina spreinging. Bensin dampar eisini, um tað er kalt.

## El-innleggingar

Brek á elektriskum innleggingum kunnu føra til skammlop og harvið eldsbruna. Kontaktir mugu eftirkannast av elektrikara, um tær kennast heitar, tá tú leggur hondina á.

## Húsarhaldstól

Húsarhaldstól, sum standa tendrað leingi (t.d. kaffimaskinur), kunnu føra til eldsbruna. Gomul tól kunnu gerast í ólagi, so vandi er fyri skammlopi.

## Gass- og trýstfløskur

Gassfløskur kunnu spreingjast, um tær gerast heitar, tí tá veksur trýstið í teimum. Halt teg burtur frá øllum trýstfløskum í nánd av eldi, uttan so at tú kanst beina tær burtur, áðrenn hiti kemur at teimum. Sig sløkkiliðnum frá, um trýstfløskur eru inni.

## Halogenlampur

Ein halogenlampa kann gerast yvir 500°C. Hitin er tí so nógvur, at hann kann festa í okkurt eftir lítlari løtu. Halogenlampur mugu tí ikki standa ov tætt at tilfari, sum kann brenna, so sum bøkur og pappír.

## Hvar hendir tað?

Flestu deyðseldar kykna í stovu, køki og sovikamari. Lívshættisligur roykur breiðir seg eftir 3-4 minuttum, eftir at eldurin er kyknaður.

## Nær hendir tað?

Flestu deyðseldar kykna um kvøldið og um náttina.



# Hvussu fyribyrgi eg?

## Minka um vandan

Tað eru fleiri mátar at fyribyrgja eldsbruna og avleiðingar av honum. Ger eina rýmingarætlan og vís øllum í húskinum rýmingarleiðirnar. Serliga børn og eldri eru í vanda, tí tey ofta ikki eru før fyri at verja seg fyri eldi. Eldri doyggja sum heild oftari í eldsbruna enn aðrir aldursbólkar, og í Føroyum eru nógv børn deyð í eldvanlukkum seinnu árini.



## Børn serliga viðkvom

Nógvar vanlukkur standast tíverri av, at børn ikki duga við eldi. Far tí gjøgnum heimið saman við børnunum og vís teimum, hvar rýmingarleiðir, sløkkiútgerð og roykvarnarar eru, og hvussu tey virka.

### Lær tí børnini:

- At tey endiliga ikki mugu goyma seg fyri eldi í t.d. skápum ella undir seingini
- At tey skulu sleppa sær út beinanvegin, tá tey síggja royk, eld ella hoyra roykvarnaran
- Hvussu tey sleppa út gjøgnum hurðar og vindeygu í neyðstøðum
- At tey skulu bíða uttanfyri og endiliga ikki rýma, tá tey eru komin út, so onnur ikki halda, at tey enn eru inni í húsinum

## Góð ráð

**Ansa eftir halogenperum**
Halogenperur kunnu gerast yvir 500°C og festa tí ógvuliga lætt í tilfar. Syrg fyri, at halogenlampur standa á tryggum undirlagi og ikki á sofukanti ella líknandi.

**Gev tólum luft**
Ansa eftir, at sjónvarp, køliskáp, telda o.s.fr. ikki standa ov trongt og verða ov heit.

**Sløkk el-tól**
Sløkk øll elektrisk húsarhaldstól, tá tú ert burturstaddur. Sløkk eisini, um tólini ikki virka, sum tey eiga.

**Kanna hitan**
Sløkk elektriskt tól, um tey gerast ov heit. Bind ikki ov nógv tól í somu kontakt.

**Reinsa feitt**
Eldur kann lættliga festa í skitið feitt. Reinsa tí eimhettuna og aðra útgerð javnan, har feitt savnast.

**Kanna roykvarnararnar**
Í minsta lagi eina ferð um árið (t.d. 1. desember) skulu roykvarnarar eftirkannast og battaríini skiftast.





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Hvussu geri eg, tá eldur kemur í?

## Bjarga og boða frá

At bjarga fólki er tað týdningarmesta, tá eldur er í. Síðani skalt tú boða Alarmsentralinum frá á tel 1-1-2.

1 1 2

## Sløkk smáar eldar

Bíða við at royna at sløkkja eldin, til tú hevur bjargað og boðað frá, uttan so at eldurin er so lítil, at ongin vandi stendst av honum. Sløkk við vatni, tí tað virkar kølandi. Tað ræður um at spræna tað á heldur enn at stoyta tað á, tí tað er kølingin heldur enn vatnnøgdin, sum køvir eldin. Spræn á tað, sum brennur heldur enn á logarnar – soleiðis sleppur tú eisini betur undan roykinum.

## Slepp tær burtur

Eydnast ikki at sløkkja, skalt tú sleppa tær burtur. Seinka brenningini við at lata hurðar og vindeygu aftur, so luft ikki sleppur til. Minst til at halda teg niður móti gólvinum, tá tú rýmir, um roykur er inni. Savna alt húsfólkið uttan fyri húsið, har sløkkiliðið lættast sær tykkum. Ávara sløkkiliðið, um fólk, djór, trýstfløskur ella eldfim evni eru í húsinum.

## Fyrstahjálp

Brunasár kunnu vera sera álvarsom. Brunasárið skal haldast undir rennandi vatni, inntil læknahjálpin kemur. Tak leys klæðir burtur av brunasárinum, men smyr ongantíð salvu á.

## Um eldur er í...



**tær sjálvum**
Kasta teg niður á gólvið og rulla runt. Ella far undir brúsuna. Renn ikki út.



**fólki**
Sløkk við vatni ella teppi. Legg fólkið niður, so logarnir ikki koma í andlitið. Lat tey úr leysum klæðum og køl við vatni, til læknahjálp kemur.



**træi, klæði, innbúgvi o.t.**
Sløkk við vatni ella eldsløkkjara. Spræn á tað, sum brennur – ikki á logarnar. Ella sløkk við at halda einum brandteppi á.



**feitti/olju**
Sløkk fyri ovni/plátu og køv eldin. Legg eitt lok ella brandteppi omanyvir. Koyr ongantíð vatn á, tí tað kann elva til eina dampspreinging.



**el-útgerð**
Sløkk bara við vatni, um tú hevur sløkt kontaktina ella togað stikkið út, so tú ikki fært stoyt. Ella brúka eldsløkkjara.



**Tipp**
Hevur tú øl ella sodavatn við hond, tá eldur kyknar, er tað væl egnað at sløkkja lítlan eld. Rist fløskuna og spræn á eldin.